

*Í dag kemur Sovereign Explorer, boripallurin, sum skal bora fyri Statoil, í føroyskan sjógv*

# Ævintýrið er byrjað…

## Sovereign Explorer kemur í føroyskan sjógv í dag

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*

Í dag kemur boripallurin, sum skal bora fyri Statoil, Sovereign Explorer, í føroyskan sjógv. Í næstu viku verður borurin væntandi settur í føroysku undirgrundina, og longu tá kann roknast við, at eini 1.000 – 1.200 fólk arbeiða í oljuvinnuni í Føroyum.

Í næstum kemur Westnavion, boriskipið, sum skal bora fyri BP, í føroyskan sjógv.Øll – sum arbeiða í frálandavinnuni – skulu gjalda 35% í skatti í Føroyum frá fyrsta degi.

Í Havn sæst aktiviteturin longu av oljuvinnuni. Bara í fyrisitingunum hjá oljufeløgunum starvast millum 50 og 100 fólk, men fer framleiðslan í gongd kann hetta talið faldast við 100.

Øll hesi fólk skulu eisini ferðast um flogvøllin í Vágum, so oljuævintýrið er byrjað…

## Loyvishavarin hevur ábyrgdina

**Verður olja funnin, verður talan um stóra umsiting,. Men bara leitivirksemið fer at geva skattaumsitingin nógv at gera**

OLJUSKATTUR
*Eirikur Lindenskov*

Seinastu tíðina hevur gingið sum rótasúpan, at deildin hjá Tolli og Skatti, sum skal krevja inn skattin úr oljuvinnuni, ikki skal liggja í Havn, men í Klaksvík.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, segði við Sosialin í gjár, at eingin avgerð enn er tikin um, hvar deildin skal liggja, men at hann í tinginum hevur ført fram, at deildin ikki skal liggja í Havn.

Skattafyrisitingin er býtt upp í økisskrivstovur, har tann størsta er tann fyri Suðurstreym. Keldur, sum Sosialurin hevur tosað við siga, at tað sum so eingin trupulleiki er at gera eina serskilda deild at taka sær av innkrevjingini frá oljuvinnuni, og at tað eisini ber til at leggja hana aðrastaðni enn í Havn.

Einasti trupulleikin er, at oljufeløgnin hava sínar høvuðsskrivstovur í Havn, og tað verða tey, sum koma at samskifta við oljuskattadeildina, og tað verður kanska truplari, liggur hon langt burtur frá Havnini.

Men greitt er, at verður olja funnin, so verður talan um eina stóra fyrisiting, tí øll sum fara at arbeiða í føroyskum sjóøki skulu rinda 35% í skatti í Føroyum.

Ábyrgdina fyri, at øll skattaviðurskiftini eru í lagi, hevur loyvishavarin, so tað verða oljufeløgini, sum skulu tryggja, at øll hesi viðurskiftini eru í lagi.

# Fyrsti brunnurin á føroyska landgrunninum boraður í næstu viku



*– Vit mugu tó ikki gloyma, at vit tosa um leitiboringar, og at flestu oljuframleiðandi londini rundan um okkum høvdu long leitiskeið, áðrenn framleiðsluverdar nøgdir av kolvetni vórðu funnar, sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum*

## Statoil fekk endaligu góðkenningina seinnapartin í gjár

OLJUVINNA
*Eirikur Lindenskov*

Beint fyri evstamark hjá Sosialinum í gjár komu boðini frá Oljumálastýrinum um, at Statoil seinnapartin í gjár fór at fáa góðkenningina at fara undir fyrstu leitiboringina eftir olju á føroyska landgrunninum.

– Boripallurin Sovereign Explorer, sum skal bora brunnin hjá Statoil samtakinum, er á veg móti Føroyum og verður væntandi á boristaðnum í morgin, segði Oljumálastýrið tíðindaskrivi.

Transocean, sum eigur pallin, roknar við, at eini fýra dagar ganga við at leggja pallin fyri akker á røttum stað, soleiðis at boringin kann byrja um miðu næstu viku.

Statoil hevur loyvi nummar 003, sum fevnir um eitt økið í ein landsynning úr Føroyum tætt við bretska markið. Brunnurin verður boraður á Longan leitmiðinum á 5° 11’ 03.38”V og 60° 30’50.09” N. Havdýpið á staðnum er 941 metrar.

Boringini er mett at taka 2-3 mánaðar.

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum, sigur, at tað er ein spennandi tíð við nógvum avbjóðingum, sum liggur fyri framman:

– Vit mugu tó ikki gloyma, at vit tosa um leitiboringar, og at flestu oljuframleiðandi londini rundan um okkum høvdu long leitiskeið, áðrenn framleiðsluverdar nøgdir av kolvetni vórðu funnar.

Vit hava fingið ein stóran møguleika, sum eg haldi, vit skulu taka. Tað er ongin grund at stúra fyri, at tað ikki skal eydnast Føroyum at skipa oljuvinnuna á ein hátt, sum kemur samfelagnum til góðar, samstundis sum vit tryggja, at oljuvinnan ikki fær ov stóra ávirkan á samfelagið, mál og mentan.

– Eg eri vísur í, at ein møgulig oljuframleiðsla ber fleiri møguleikar enn vansar við sær, sigur hann.

Fyrsta loyvisumfarið á føroyska landgrunninum varð latið upp 17. februar 2000, og móttók Oljumálastýrið 22 umsóknir frá 17 feløgum. 17. august sama ár veitti landsstýrismaðurin í oljumálum 7 leiti- og framleiðsluloyvi til 12 feløg, tey flestu skipað í samtøk.

Umframt Statoil fara BP og Amerada Hess samtakið eftir ætlan eisini at bora í summar.

